## Vandi fyri oljutroti

Forstjórin í oljufelagnum Total sigur nú, at vandi er fyri, at ov lítil olja verður á marknaðinum um nøkur ár, tí fíggjarkreppan hevur gjørt, at oljufeløg hava aftrað seg við at brúka pengar til at nýggjar leiðir og størri framleiðslu. Christophe de Margerie sigur við bretska kringvarpið BBC, at verða neyðug stig ikki tikin nú, er talan um eitt veruligt vandamál. Tað ber ikki til at bíða tvey ella trý ár afturat, sigur hann. Sambært Total-stjóranum hava feløgini funnið nóg nógva olju, men tey hava ikki brúkt pengar til at fara undir framleiðslu, og tað mugu tað taka støðu til skjótt. De Margerie leggur afturat, at oljuprísurin, sum nú er um 70 dollarar, fer ætlandi upp um 100 dollarar.



# Norröna fullfermd hvønn túr

**Tað hevur verið ógvuliga trupult at fingið bil niður við Norrönu, og orsøkin er hon, at skipið er fult hvønn túr**

FERÐING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




- Vit eru í tí hepnu støðu, at skipið er fult hvønn túr.

Tað sigur Peter Holm, stjóri í Smyril Line, tá vit fregnast um gongdina hjá felagnum.

Hann letur væl at árinum í síni heild.

- Hásesongina – juni, juli og august – hevur Norröna ført eini 1200-1300 fólk hvønn túr, meðan mynstrið í mai og serliga nú í september er heldur ørvísi, sigur Peter Holm.

Meðan hvørt kamar er fult í hásesongini, eru tað serliga meiri tilkomin fólk, sum ferðast við bili hvørju megin við, í mai og september.

- Talan er ofta um tilkomin fólk, sum ferðast tvey við bili, og sum so keypa eitt fýrakoyggju kamar, fyri at hava frið. So meðan bildekkið er fult, eru eisini kømurini upptikin. Vit flyta bara ikki 1200 fólk hvønn túrin, men eini 800, sigur Peter Holm.

Stóra talið av ferðandi merkir so eisini, at fleiri standa eftir og fáa ikki pláss fyri bilinum.

- Tað eru fleiri privatfólk, sum ringja og spyrja um pláss, men einasta vit kunnu siga er, at tey mugu vera fyrri úti við bíleggingini, sigur stjórin í Smyril Line.

### Sær gott út

Trupulleikin hjá felagnum er framvegis veturin.

- Vit eru alla tíðina opnir fyri møguleikum hjá skipinum um veturin. Tað er tann tunga tíðin. Summarhálvárið hevur gingið eftir ætlan, og eftir at vit hava skorið órentablu ruturnar til Noregi og Skotland burtur, sær gott út hjá okkum, sigur Peter Holm.

Á aðalfundinum varð upplýst, at leiðslan roknaði við einum avlopi á 13 milliónir, og tann metingin sær út at halda.

- Botnlinjan verður munandi penari í ár enn hon var í fjør, og metta avlopið fara vit heilt víst at náa – um ikki okkurt heilt óvæntað hendir skeiva vegin, sigur Peter Holm.

*Talan verður um eitt útmerkað úrslit hjá okkum í ár – um ikki okkurt púra óvæntað hendir skeiva vegin, sigur Peter Holm, stjóri á Smyril Line*

Teimum stendur í boði at leiga Norrönu út í tvær vikur í desember, og tað er ein møguleiki, sum felagið illa hevur ráð til at siga nei til.

- Endalig støða verður væntandi tikin til hetta seinni í vikuni, men verður skipið leigað út, fer tað ikki at órógva jólatúrarnar, sigur Peter Holm.

Smyril Line leigar ein part av deksplássinum út til Smyril Blue Water, og hava sostatt eisini bundi seg at flyta frakt fyri felagið. Tí verður tað ein spurningur um at kombinera tað við eitt møguligt leigumál.

### Óvist við Íslandi

Norröna siglir eisini upp á Ísland um summarið, og í fjør varð avgjørt eisini at sigla upp á grannarnar fyri vestan vetrarhálvárið. Men enn er støða ikki tikin til, hvussu verður eftir 1. oktober.

- Tað verður støða tikin til eftir 1. oktober. Vit fara at seta okkum í samband við farmafeløgini, og verður siglt upp á Ísland komandi vetur, verður tað gjørt í samráð við tey, sigur Peter Holm.

Eitt annað, sum støða verður tikin til fyrsta dagin, er hvør skal taka við sum sølu- og marknaðarleiðari, nú Jákup Sverri Kass fer til Atlantsflog at starvast.

- Eg havi ikki hug at siga so nógv um tað enn, men støða verður tikin til avloysaran í komandi viku, sigur Peter Holm.

Nú fyrsti oktober nærkast verður skorið burtur av manningini. Hon er størst teir tríggjar summarmánaðirnar, minkar í mai og september og er minst í vetrarhálvuni.

# Eyðstein vann í Danmark

**Tveir av teimum trimum seyðahundamonnunum, sum eru á veg til EM í Sveits, tóku lut í kvalifikatiónskapping í Danmark. Eyðstein Jensen við hundinum Nap var í serflokki**

SEYÐAHUNDAR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Eyðstein Jensen – her avmyndaður við Nap til venjing á Viðareiði – vann kvalifikatiónskappingina í Danmark greitt*

Tríggir føroyingar eru ávegis til EM í seyðahundakapping í Sveits, og sunnudagin tóku tveir teirra lut í fyrstu kvalifikatiónskappingini fyri danir til EM komandi ár.

- Vit skuldu í veruleikanum ikki vera við, men vit vórðu uppringdir leygarmorgunin, tá vit vóru komnir niður, og bodnir við, tí nøkur avboð vóru komin, sigur Rene Hansen, sum saman við Eyðstein Jensen var við í donsku kappingini.

Meiningin var, at triði maðurin, Kjeld Nattestad, skuldi koma niður í gjár, men hann kemur ikki fyrr enn í dag. Tá ferðaliðið er samlað, verður leiðin sett niður móti Sveits og býin Hasselhof, beint uttan fyri Bern, har kappingin verður hildin.

Í kvalifikatiónskappingini sunnudagin var Eyðstein Jensen við hundinum Nap púra suverenur og vann kappingina greitt. Á triðja plássi kom Rene við hundinum Hvess, og hann var bert eitt stig frá øðrum plássi.

So sigast má, at upptaktin til EM hevur verið góð, og tað gevur eisini góðar vónir til EM kappingina, sum byrjar hósdagin á miðdegi.

- Okkara vón er, at fáa onkran hund við í finaluna, og eftir góða úrslitið her í Danmark eru tær vónirnar ikki minni. Hini árini hava føroyingarnir ligið mitt í á stigatalvuni, sigur Rene Hansen.

Vansin er sjálvandi, at teir ikki vita, hvat teir koma til niðri í Sveits.

- Vit vita einki um umstøðurnar og vit vita einki um, hvat tað er fyri seyður, vit koma út fyri í kappingini. So vit mugu bara síggja tíðina ann og vita, hvussu leikur fer, sigur Rene Hansen.

Byrjað verður hósmorgunin við læknatjekki av hundunum, og so byrjar kappingin á miðdegi sama dag.

- Vit skulu ikki í eldin fyrr enn fríggjadagin, tá Kjeld Nattestad skal royna seg við Snøgg og eg sjálvur skal kappast við Taff. Leygardagin verður tað so Eyðstein Jensen við Nap og eg sjálvur við Hvess, sigur Rene Hansen.

Finalan verður sunnudagin, og tá skulu 15 av teimum 89 luttakandi hundunum royna seg í kappingini um heitið sum besti seyðahundur í Europa 2009.